SJÚKRAHÚS VERKIÐ

Landssjúkrahúsið

# Vistarveiting til 100 ára føðingardagin hjá Landssjúkrahúsinum

Útboð – Mars 2024

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo

ls.fo

# Innihald

Innleiðing ..... 2
Lýsing ..... 2
Kravfesting og vekting ..... 2
Avtala og karmar ..... 4
Meting um tilboðini ..... 5
Tilgongdin frameftir ..... 5
Tíðarætlan ..... 6
Fyrivarni og alment innlit ..... 6



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

SJÚKRAHÚS VERKIÐ

## Innleiðing

Landssjúkrahúsið bjóðar út samstarv um vistarveiting. Útboðið verður gjørt sambært ”Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum”.

## Lýsing

Landssjúkrahúsið verður 100 ár, og skal hetta hátíðarhaldast. Veitslan verður í Ítróttarhøllini á Hálsi 4. mai 2024. Í sambandi við hetta skal vistarveitingin bjóðast út. Veitslan verður fyri starvsfólkum á øllum trimum sjúkrahúsunum og fyri innboðnum. Tilsamans luttaka uml. 1.200 persónar til veitsluna.

## Kravfesting og vekting

Í sambandi við føðingardagsveitsluna hava vit tørv á, at tilboðið inniheldur:

| | |
|---|---|
| Dagfesting | 100 ára føðingardagurin verður í Ítróttarhøllini á Hálsi 4. mai 2024**.**<br>Ynskiligt er, at ein veitari verður valdur skjótast tilber. |
| Samstarv | Landssjúkrahúsið og veitarin arbeiða saman við at finna júst røttu vistarveiting í sambandi við veitslu v.m. |
| Innheintan av tilboðum: | Vit ynskja ymisk tilboð (sí niðanfyri). |
| Tilboð 1: | Íroknað í tilboðnum: (prísur við og uttan mvg)<br><br>• Pinnamatur/brellbitar í sambandi við vælkomst<br>• 3 rættars matskrá, íroknað kaffe/te<br>• Náttarmat<br><br>Prís uttan drekkjuvørur (vælkomst og vín til matin)<br>Prís við drekkjuvørum (vælkomst og vín til matin)<br><br>Sí eisini pkt. “minstu krøv til veiting" niðanfyri. |
| Tilboð 2: | Íroknað í tilboðnum: (prísur við og uttan mvg)<br><br>• 3 rættars matskrá, íroknað kaffe/te<br>• Náttarmat<br><br>Prís uttan drekkjuvørur (vín til matin)<br>Prís við drekkjuvørum (vín til matin) |



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

| | |
|---|---|
| | Sí eisini pkt. “Minsta krav til veitara" niðanfyri. |
| Krøv til veiting | Talan verður um eina veitslu fyri uml. 1.200 gestum, og ynskja vit heildarveiting frá einum veitara:<br><br>• Veitarin veitir kokkar/tænarir/starvsfólk í sambandi við vistarveitingina.<br>• Veitarin skal kunna veita borðbúnað til valdu matarskrá og drekkivørur, sum antin veitari ella Landssjúkrahúsið veitir.<br>• Veitarin stendur fyri, at borðini verða dekkaði/klárgjørd, so klárt er at borðreiða við matarskránni.<br>• Avrudding/uppvask av borðbúnaði ol.<br>• Tænarar/starvsfólk hjá valdum veitara skeinkja drekkivørur til borðhaldið. |
| Minsta krav til veitara | • Veitari skal í minsta lagi hava skipað fyri 3 veitslum, har vistarveitt/borðreitt hevur verið fyri 600+ gestum. |
| Skjøl og upplýsingar, ið skulu brúkast til eftirmeting av innkomnum tilboðum | • Tal av slíkum veitslum tilboðsgevari hevur roynt í intervallunum<br>    ○ 600 - 1000 persónar<br>    ○ 1000+ persónar<br>    ○ Hvørjar veitslur er talan um, hvørjar fyritøkur og/ella stovnar?<br>    ○ Sjúkrahúsverkið tilskilar sær rætt at kunna seta seg í samband við hesar fyritøkur og stovnar.<br>    ○ Tað er ikki neyðugt og eitt krav, at mann kemur við fleiri enn 5 dømum uppá veitslur av hesum slagnum.<br><br>• Ætlan um hvussu tilboðsgevari ætlar at loysa uppgávuna<br>    ○ Veitarin skal koma við einari ætlan, um hvussu veitarin ætlar at skipa seg í Ítróttarhøllini á Hálsi í sambandi við eina vistarveiting til uml. 1.200 persónar.<br>    ○ Ætlanin skal í minsta lagi innihalda eina meting av, hvussu nógv starvfólk veitarin ætlar at hava á staðnum, og hvussu skjótt mann væntar at kunna servera hvønn rætt sær.<br>    ○ Ætlanin skal í mesta lagi vera 3 síður.<br><br>• Um veitslubólkurin metir tað vera neyðugt, er ynskið at møguligt verður at royndarsmakka valdu matskrá, og at pláss verður fyri smærri rímiligum broytingum. |

| | |
|---|---|
| Ábyrgd | • Veitarin hevur ábyrgdina av, at alt arbeiðið er gjørt rætt í mun til væntanir og innihald í hesum tilboði.<br>• Veitarin hevur eisini ábyrgdina av at standa fyri sjálvari vistarveitingini í samstarvi við okkara veitslusamskipara. |
| Vekting - Veitarin verður valdur eftir: | Veitarin verður valdur út frá hesum fortreytum:<br>• Prísi 50%<br>• Royndir og góðska 50%<br>• Við royndum og góðsku verður meint:<br>  ○ Tal av slíkum veitslum tilboðsgevarin hevur roynt áður<br>  ○ Hvussu tilboðsgevarin ætlar at loysa uppgávuna<br>  ○ Matarskrá |
| Samband, spurningar og svar | • Øll tilboð skulu latast inn umvegis teldupostin hr@ls.fo.<br>• Somuleiðis viðvíkjandi spurningum og svarum. Spurningar og svar verða gjørd anonym og verður svarað leypandi fram til tíðarfreistina. |



## Avtala og karmar

Avtala verður gjørd við ein veitara av vistarveiting og tí, sum har til hoyrir.

Veitarin, ið vinnur útboðið, skal halda seg til tilboðið í tilgongdini, og seta vit tíðarfreistir í felag.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo

## Meting um tilboðini

Prísur vektar 50%, og verða stig givin eftir frymlinum

$$\frac{Lægsti\ tilboðsprísur}{Tilboðsprísur} \cdot 50$$

Tilboðið við lægsta prísinum pr. kuvert fær 50 stig, og restin fær so stig í mun til lægsta tilboðið.

Royndir og góðska vektar 50%, og eru tey býtt upp í:

- Tal av slíkum veitslum tilboðsgevari hevur roynt, 25%
- Hvussu tilboðsgevari ætlar at loysa uppgávuna, 25%

Tal av slíkum veitslum tilboðsgevari hevur roynt:

- Hvør veitsla við 600-1000 persóngar 5 stig
- Hvør veitsla størri enn 1000 persónar 10 stig.

Tó í mesta lagi 25 stig samanlagt.

Hvussu tilboðsgevari ætlar at loysa uppgávuna:
5 Her verða latin stig eftir einari heildarmeting av, hvussu tilboðsgevari ætlar at loysa uppgávuna, tal av starvsfólkum, tíð til at servara, rudda av og líknandi. Til at meta um hetta verður serligur ráðgevi nýttur. Fyri hetta verður í mesta lagi latin 25 stig.

Dømi um eftirmeting.

| | Prísur | Stig fyri prís | Tal av royndum: 600-1000 | Tal av royndum 1000+ | Lýsing av loysn | Góðska | Samla stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tilboð 1 | 550 | 50 | 5 | 0 | 10 | 35 | 85 |
| Tilboð 2 | 600 | 46 | 3 | 2 | 15 | 40 | 86 |
| Tilboð 3 | 650 | 42 | 4 | 1 | 20 | 45 | 87 |

Tilboð 3 gerst vinnari í hesum døminum.

## Tilgongdin frameftir

Tá ein veitari er funnin, verður avtalan endaliga ment í samstarvi millum Landssjúkrahúsið og veitaran.

## Tíðarætlan

- Mánadagin 11. mars 2024. Útboð almannkunngjørt á Keypsportalinum, www.keypsportal.fo
- Spurnaðarfreist: mikudagin 20. mars kl. 12:00. Spurningar eftir hetta verða ikki svaraðir. Spurningar skulu sendast til hr@ls.fo og verða hesir svaraðir leypandi umvegis Keypsportalin.
- Tilboðfreistin er mikudagin 27. mars kl. 12:00. Tilboð skulu latast inn umvegis hr@ls.fo. Tilboð latin inn eftir hetta, verða ikki viðgjørd.
- Í seinasta lagi mikudagin 5 apríl kl. 16 verður vinnarin kunngjørdur, og allir tilboðsgevarar fáa boð um hetta umvegis teldupost.

## Fyrivarni og alment innlit

Tann, ið letur inn tilboð, eigur at hugsa um fyrivarni í mun til útboðstilfarið, tí at Landsjúkrahúsið er fevnt av lóg um alment innlit.

Eitthvørt fyrivarni viðførir, at Landssjúkrahúsið kann vísa burtur innlatið tilboð.

Landssjúkrahúsið tilskilar sær rætt til ikki at taka av nøkrum av innkomnu tilboðunum. Eisini tilskilar Landssjúkrahúsið sær rætt til at havna einum tilboði, um vøran, ið verður bjóðað framm, er uttan fyri rímiligt mark, tá talan er um góðsku.

Fæst ikki ein sáttmáli við ein veitara, tilskilar Landssjúkrahúsið sær rættin til at býta vørubólkarnar upp í fleiri partar og at samráðast víðari við einstakar tilboðsgevarar við støði í innkomnu tilboðunum.



LANDSSJÚKRAHÚSIÐ
J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo